LØGTINGIÐ

**Býtið av løgtingsmálum í mun til løgtingsnevndirnar**

Løgtingsformaðurin hevur tikið avgerð um, at løgtingsmálini verða býtt soleiðis í nevnd:

- Løgtingsmál frá løgmanni verða beind í **Rættarnevndina**, tá talan er um lógarmál v.m. Er talan um yvirtøkumál og yvirskipaðu viðurskifti Føroya mótvegis Danmark, verða hesi beind í **Uttanlandsnevndina**.
- Løgtingsmál frá landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum verða beind í ávikavist **Uttanlandsnevndina** og **Mentanarnevndina**.
- Løgtingsmál frá landsstýrismanninum í heilsumálum verða beind í **Trivnaðarnevndina**.
- Løgtingsmál frá landsstýrismanninum í almannamálum verða beind í **Trivnaðarnevndina**.
- Løgtingsmál frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verða beind í **Vinnunevndina**.
- Løgtingsmál frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum verða beind í **Fíggjarnevndina**, tó undantikið løgtingsmál um samferðslu og ferðslu, sum verða beind í **Rættarnevndina**. Harafturat verða øll uppskot til verklagslógir eisini beind í **Fíggjarnevndina**.
- Løgtingsmál frá landsstýrismanninum í vinnu- og umhvørvismálum verða beind í ávikavist Vinnunevnd og Rættarnevnd á henda hátt:
  **Vinnunevndin**: Vinnumál (herundir ALS- og barsilsskipanarmál), landbúnaðarmál og orkumál.
  **Rættarnevndin**: Innlendismál, kommunumál og umhvørvismál (herundir arbeiðsmarknaðar- og arbeiðsumhvørvismál).

Á Løgtingi, 4. oktober 2019

Jógvan á Lakjuni
løgtingsformaður

LOGTING.FO

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901